# Renault Mégane II
## – nú sum sedan og stationcar




*Renault Mégane II 1,6 Touring. Bilurin er arbeiðsligur, og lætt er at leggja baksetrini niður, uttan at taka nakkapúturnar av*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Renault Megane II, sum fyrr í ár kom á marknaðin sum hatchback við 3 og 5 hurðum, vakti ans millum fólk við sínum øðrvísi og smarta designi. Nú fæst Mégane eisini sum Coupé-Cabriolet, sedan og stationcar**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Nú er nýggja Mégane skráin hjá Renault víðkað við Coupé-Cabriolet, sedan (Sport Sedan) og stationcar (Touring).

Renault Mégane II kom sera væl frá byrjan. Fyrst bleiv hann valdur til "Car of the Year 2003", síðan fekk hann fimm stjørnur í EuroNCAP testunum.

Hetta sigur nakað um at bilurin ikki bert hevur útsjóndina við sær men eisini trygdina, komfortin og koyrieginleikarnar.

SportsSedan hevur eins og hatchback sera smart design, hann er rúmligur og hevur stórt viðførisrúm.

Stationcar útgávan, Touring, er 23 cm longri enn hatchback. Har er gott pláss til tey ferðandi og teirra viðføri. Baksetrini eru løtt at leggja niður, uttan at nakkastútturnar mugu takast av.




*Renault Mégane II Sport Sedan. Her er stórt og rúmligt viðførisrúm*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Síðuairbag og gardinairbag eru standard. Mégane II fáast við trimum bensinmotorum við ávikavist 98, 115hk og 140 hk, primo 2004 kemur ein 2.0 Turbo við 225 HK, og tveimum dCi turbo dieselmotorum við beinleiðis common-rail innspræning, hesir hava ávikavist 80 og 120 hk. Fyrst í komandi ári kemur ein dCi við 100 HK.



*Renault Megane II innan. Bilurin verður settur í gongd við SmartCard*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Allar útgávurnar hava elektriska servostýring og koyrieginleikarnir eru í besta franska stíli. Teir eru væl útgjørdir við standard útgerð sum t.d. fjarstýrdum sentrallásum, hita í forsetrunum, hæddarstilling av førarasetri, elektroniskum oljumátara, fjarstýring av radio í rattinum, í næsta útgerðsvarianti hava teir aircondition við køling av handskarúminum, separat spotljós bæði aftan og framman, tokulyktir, dúrkljós framman og aftan og regnsensor.

Eins og á Renault Laguna verða Mégane II settir í gongd uttan startlykil, við einum korti, SmartCard.

Prísirnir á sedan byrja við kr. 189.000,- og stationcar byrja við kr. 194.000,-

RENAULT

### Renault Mégane II 1,6 Touring Comfort Expression

| | |
|---|---|
| Motorurin | 1,6 litur 4 syl. bensin við 115 hk |
| 0-100 km/t | 10,9 sek. |
| Bensinnýtsla | 14,7 km/l |
| Dekkstødd | 195/65-15 |
| <u>Stødd og vekt</u> | |
| Longd | 444,0 cm |
| Breidd | 178,0 cm |
| Hædd | 147,0 cm |
| Eginvekt | 1225 kg |
| Prísur | 219.000 Kr. |
| <u>Søluumboð</u> | VR Bilar<br>Hoyvíksvegur<br>FO-100 Tórshavn<br>Tel. 322110 |






*Hesin Toyota Hiace við 2,7 litur bensinmotori og 143 hk er uppbygdur til sjúkrabil á Landssjúkrahúsinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Atli Simonsen, varaleiðari og Jákup Nolsøe, leiðari á Sjúkraflutningstænastuni á Landssjúkrahúsinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Sjúkrabilurin innan. Arbeiðið er væl úr hondum greitt, og eingin munur er á hesum bilinum og á sjúkrabilum, sum verða uppbygdir uttanlands*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Sjúkrabilur uppbygdur á Landssjúkrahúsinum

**Landssjúkrahúsið hevur nú fingið fyrsta sjúkrabilin, sum teir sjálvir hava uppbygt. Talan er um ein Toyota Hiace við 2,7 litur bensinmotori 143 hk. Á Sjúkraflutningstænastuni eru teir sera væl nøgdir við hesa loysn**

SJÚKRABILUR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Vit hava nú fleiri ár hoyrt um at sjúkrabilarnir kring landið eru ov gamlir og í vánaligum standi. Fyri at spara hevur Landssjúkrahúsið keypt fleiri sjúkrabilar úr onkrum av grannalondum okkara.

Teir nýggju sjúkrabilarnir sum teir hava keypt, hava ofta verið uppbygdir í Norra ella í Íslandi. Hesar uppbyggingar kosta nógv, og eru ein orsøk til at bilarnir eru dýrar at keypa, og verða teir tí brúktir í mong ár.

Nú er so tann fyrsta royndin hjá Landssjúkrahúsinum gjørd við at keypa ein nýggjan bil og sjálvir byggja hann um til sjúkrabil. Í góðum samstarvi við leiðsluna hevur tað eydnast at fáa fígging til hendan fyrsta bilin.

Bilurin er ein Toyota Hiace av longra modellinum við 2,7 litur bensinmotori við 143 hk, sum er keyptur frá Reyni Service. Hetta man vera tann einasti av hesum slagnum, sum er komin til landið við bensinmotori.

Atli Simonsen, varaleiðari á Sjúkraflutningstænastuni á Landssjúkrahúsinum, hevur staðið fyri arbeiðinum og gjørt meginpartin av arbeiðinum sjálvur. Bilurin hevur alt tað sum hoyrir til ein nútímans sjúkrabil, skáp og hillar eru gjørd soleiðis at tað passar til bilin og sær út sum originalt. Í bilinum er alt tað, sum brúk er fyri í eini neyðstøðu, sum til dømis tól til at geva stoyt til ein persón sum hevur fingið hjartastopp o.l.

Arbeiðið er væl úr hondum greitt, og eingin munur er á hesum bilinum og sjúkrabilum, sum vera uppbygdir uttanlands, uttan tað at hesin er væl bíligari.

Hetta er ein spennandi roynd hjá Landssjúkrahúsinum. Á Sjúkraflutningstænastuni vænta teir, at nú verður trupulleikin við at koyra við gomlum og óálítandi sjúkrabilum loystur, nú teir sjálvir kunnu uppbyggja sínar sjúkrabilar eftir egnum ynski, og teir kosta væl minni, enn teir annars høvdu kostað, um teir blivu keyptir liðugtgjørdir.

## Subaru B9 Scrambler



Í 60-unum bleiv ofta sagt um Rambler bilarnar: Rambler skrambler. Á Tokyo Motor Show stóð hesin Subaru B9 Scrambler, sum er eldrivin upp til 70 km/t, síðan tekur bensinmotorurin yvir

*Kelda: FDM / Motor*

## Subaru R1



Hesin Subaru R1 býbilurin vakti ans á Tokyo Motor Show. Designstjórin hjá Subaru eitur Andreas Zapatinas, og hann er komin frá Alfa Romeo í Italiu

*Kelda: FDM / Motor*

## Nissan C-note



Nissan C-note er bygdur yvir sama plattform sum Renault Mégane. C-note verður ivaleyst nýggi Nissan Almera í Japan, evropeiska útgávan verður annarleiðis

*Kelda: FDM / Motor*